# FUGLAFJARÐAR KVØLDSKÚLI 2017/2018



Helena Kjeld

– Innihaldsrík, kveikjandi og skapandi frítíð fyri allar aldursbólkar




Helena Kjeld

## Piddasahandil /Ribarhús

www.ribarhus.com

| Skeið 01: | Stokkakvøld |
|---|---|
| Hvar: | Ribarsloft |
| Nær: | Hós. kl. 19.00 – 22.00. Byrjar 19. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – apr. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. (hálvt skeið 400 kr) |
| Tilmelding: | Dagmar Beder, 583583 |

Vit hittast í hugnaligum umhvørvi at binda og hekla tað, vit hava hug til; fáa vegleiðing og frálæru í ymsum teknikkum. Stokkakvøldið er ætlað royndum sum óroyndum.

| Skeið 02: | Kom og seyma barnaklæðir |
|---|---|
| Hvar: | Ribarsloft |
| Nær: | Mánakvøld kl. 19.00 – 22.00<br>Byrjar 16. oktober |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mars 2018 |
| Kostnaður: | Kostnaður 800 kr. (hálvt skeið 400 kr) |
| Tilmelding: | Edna Jacobben, 225640 |

Til tey ið hava hug at seyma barnaklæðir.

| Skeið 03: | Leygardagsseyming<br>– seyming fyri øll |
|---|---|
| Nær: | 5 ferðir árenn jól og 5 ferðir aftaná. Hesar leygardagar 7.,14., 21. okt og 11., 18., ella 25. Nov. (dato fyri 2018 verða lýst á várskránni.) |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mars. 2018. Ymiskar leygardagar kl. 10 – 17. |
| Kostnaður: | 800 kr. (hálvt skeið 400 kr.) |
| Tilmelding: | Fía í Skorðini, 224246<br>og Odvør á Lakjuni, 268690 |

Skeiðið er í kreativum umhvørvi, har vit seyma klæðir til børn, vaksin ella brúkslutir til heimið. Møguleiki er at læra at gera og at brúka mynstur. Tú lærir at nýta stoffprent og broderí saman við seyming. Tú kanst seyma bæði úr gomlum og nýggjum og eisini ber til at seyma til føroysk klæðir.

| Skeið 04: | Seymiskeið: Seyma føroyska búnan lidnan |
|---|---|
| Hvar: | Ribarsloft |
| Nær: | 4 leygardagar á vári 2018<br>Kl. 9.00 – 16.00 |
| Tíðarskeið: | Hesar leygardagar: 3. feb., 17. feb., 3. mar. og 17. mar. |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Rutt Hansen, 744480 |

Á skeiðnum læra vit at skera til og seyma alt til føroyska búnan.

## Onnur tiltøk í Ribarhúsi

(ikki undir kvøldskúlanum)

| Kvinnur 60 + hittast á Ribarslofti. | |
|---|---|
| Nær: | Mánamorgnar kl. 10.00 – 12.00<br>Byrjar 6. nov. 2017 |
| Fyriskipari: | Kvinnur í Piddasa Handli. |

Sum eina roynd, ætla vit at hava kafe á Ribarhúsloftinum. Kafein er ætlað kvinnum 60 +, har tær eru vælkomnar at hittast til ein drekkamunn við onkrum leskiligum afturvið, og tað týdningarmesta, at fáa prát við aðrar kvinnur, lurta, binda, hekla, fáa hugskot og hugna sær saman.

| Level 10 Fuglafjørður: Opin klubbi | |
|---|---|
| Nær: | Týsdagar kl. 09.00 – 11.00<br>og kl. 16.00 – 17.00 |
| Fyriskipari: | Sólrun Ásta Haraldsdóttir, 288681 |

Ráðgeving og uppmuntran fyri at fáa heilsubetri lívsstíl. Viging við TANITA heilsuvekt, sum sigur hvussu tín heilsuliga støða er. Nærri kunning við at venda sær til Sólruna.

| Level 10 Fuglafjørður: Rørsla | |
|---|---|
| Nær: | Verður lýst inni á Facebook síðu<br>Level 10 Fuglafjørður |
| Fyriskipari: | Sólrun Ásta Haraldsdóttir, 288681 |

Rørsla fyri øll - ymisk stig - venjingar, sum seta feittbrenning í gongd og geva tær meiri orku og vælveru.

### Level 10 Fuglafjørður: Klænkikapping

| | |
|---|---|
| Nær: | Týsdagar kl. 17.30 – 19.00 |
| | Byrjar 10. okt. |
| Tíðarskeið: | 10. okt – 12. des. 2017 |
| Fyriskipari: | Sólrun Ásta Haraldsdóttir, 288681 |

Tú kanst vinna pengar fyri at klænka - ein motivatión fyri at byrja uppá ein betri lívsstíl. Minst 10 luttakarar.

## Fuglafjarðar Skúli

### Skeið 05: Trummuspæl

| | |
|---|---|
| Nær: | Eftir avtalu. |
| | Byrjar aftaná heystfrítíðina. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | James Goodwin, 262128 |

### Skeið 06: Hondarbeiði – brodering m.a. til føroyska búnan, lívfrøðistovan

| | |
|---|---|
| Nær: | Mán. kl. 19.00 – 22.20 |
| | Byrjar 16. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | Rutt Hansen, 744480 |

Á skeiðnum frá oktober til endan av mars, kanst tú læra og fáa hjálp at brodera ymist t.d. føroyska búnan, gardinur, dúkar, flatseyming, ensk hol, hardanger o.a.

### Skeið 07: Dramaskeið fyri børn

| | |
|---|---|
| Nær: | 4 leygardagar í heyst |
| | kl 12.00 – 16.00. 21. okt. og |
| | 28. okt. og 4. og 11. nov. 2017 |
| Tíðarskeið: | Heystið 2017 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Ása Pálsdóttir, 218320 |

Ert tú í aldursbólkinum 9-12 ár? Dámar tær væl at arbeiða saman við øðrum, at standa á einum palli og at framføra? So er hetta kanska akkurát nakað fyri teg. Her læra vit um, hvussu ein stendur á einum palli, og hvussu ein á besta hátt fangar uppmerksemi hjá áskoðarunum

### Skeið 08-09: Harmonikuspæl 1 og 2

| | |
|---|---|
| Nær: | Týs- og mikukvøld kl. 19.00 – 22.00 |
| | Byrjar 17. og 18. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | Óli Johannesen, 214162 |

Frálæra í harmonikuspæli fyri roynd og óroynd.

### Skeið 10: Klaverspæl

| | |
|---|---|
| Nær: | Eftir avtalu |
| | Byrjar aftaná heystfrítíðina |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | Leif Hansen, 273165 |

Skeiðið er bæði fyri nýbyrjarar og víðarikomin. Endamálið er, at hvør næmingur fær spælt, tað hann hevur áhuga fyri. Tað er møguligt at spæla bæði eftir nótum og akkordum. Leypandi verður tosað um musikkteori (m.a. rytmir, tónasløg, musikktekstir o. s. fr.) Hvør næmingur spælir 20-30 min. um vikuna. Møguleiki má vera at venja heima.

### Skeið 11: Gittarspæl

| | |
|---|---|
| Nær: | Mikudagar eftir avtalu. Byrjar 18. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | Bárður á Lakjuni, 222443 |

Hevur tú hug at fáa grundleggjandi gittarundirvísing í heyst/vetur, ja, so er hetta skeiðið nakað fyri teg. Undirvísingin er ætlað nýbyrjarum og slíkum, ið eru komin nakað víðari.

### Skeið 12: Tvørfloytuspæl

| | |
|---|---|
| Nær: | Mikudagar eftir avtalu. Byrjar 18. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mar. 2018 |
| Kostnaður: | 800 kr. |
| Tilmelding: | Bárður á Lakjuni, 222443 |

Hevur tú hug at fáa grundleggjandi tvørfloytuundirvísing í heyst/vetur, ja, so er hetta skeiðið nakað fyri teg. Undirvísingin er ætlað nýbyrjarum og slíkum, ið eru komin nakað víðari.

## Skeið 13: Barnakór, sangstovan

Nær: Mikudagar kl. 11.15
Tíðarskeið: Skúlaárið 2017 / 2018
Kostnaður: Ókeypis
Tilmelding: Marta á Lakjuni, 267190

Fyri øll, bæði gentur sum dreingir við áhuga fyri sangi. Øll kunnu vera við í barnakórinum í Fuglafjarðar skúla.

## Skeið 14: Lektiuhjálp: Orð- og talvenjingar, stova 205

Nær: Mánadag kl 12:35 -15.30, Týsdag kl 12:35 - 15:30, Mikudag kl 12:35 -15:30 og Hósdag kl 12:35 - 15:30
Tíðarskeið: Sep. 2017 – apr. 2018
Kostnaður: Ókeypis

Ábyrgd: Fridrikka Kjeld, orðblinda- og serlærari í lesing og skriving, 770090 Høgni Hansen, er eisini knýttur at lektiuhjálpini.

Tilboðið er fyri øll áhugaði – fyri allar næmingar í 1. fl. – 10. fl. og foreldur teirra.

## Skeið 15: Føroyskt fyri útlendingar – byrjanarundirvísing, lívfrøðistovan

Nær: Týsdag kl.19.00. Byrjar 17. okt.
Tíðarskeið: Okt. 2017 – feb. 2018
Kostnaður: Ókeypis
Tilmelding: Kristianna Jacobsen 744012 og Fía Jacobsen 244503

Skeiðið er ætlað útlendingum, sum vilja læra føroykst á byrjanarstigi.

## Course 15: Faroese for foreigners – for beginners, in the biology classroom

When: Tuesday the 17th of October at 19.00 o'clock
Duration: Oct. 2017 to Feb. 2018
Cost: Free
Teacher: Kristianna Jacobsen 744012 and Fía Jacobsen 244503

The course is intended for foreigners who want to learn Faroese at ground level.

## Skeið 16: Føroyskt fyri útlendingar – snarskeið í mállæru og rættstaving.

Nær: Byrjar saman við skeiði nr. 15 tann 17. okt. kl. 19.00 í lívfrøðistovuni
Tíðarskeið: Okt. 2016 – des. 2017. Tvær ferðir um vikuna
Kostnaður: Ókeypis
Tilmelding: Kristianna Jacobsen, 744012

Skeiðið er ætlað útlendingum, sum duga nakað av føroyskum og sum vilja betra um sínar førleikar í føroyskum í talu og skrift.

## Course 16: Faroese for foreigners – short course in grammar and spelling

When: Same time and place as course no. 15 (Tuesday the 17th of October at 7pm in the biology classroom)
Duration: Oct 2017 to Dec. 2017 (twice a week)
Cost: Free
Teacher: Sign up by contacting the teacher: Kristianna Jacobsen, phone no. 744012

The course is intended for foreigners who know some Faroese and want to improve their Faroese grammar.

### Skeið 17: Motorlæra, motorlæruhølið

Nær: Mikudag. kl. 12.45 – 14.25
Fylgir skúlaárinum
Tíðarskeið: Aug. 2017 – jun. 2018
Tilmelding: Edmund Joensen, lærari, 747203

Skeið í motorlæru. 8. fl. og eldri.

### Skeið 18: Lær at spæla bridge

Nær: Týskvøld kl. 19.00 – 21.30.
Byrjar 17. okt.
Tíðarskeið: Okt. 2017 – feb. 2018
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Magni Herason Jøkladal, 251251

Møguleiki fyri at læra seg at spæla bridge. Øll eru vælkomin.

### Skeið 19: Glasskeið fyri nýbyrjarar

Nær: 5 mánakvøld
frá 5. feb – 5. mar. 2018
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Sædis Elifsdóttir, 229298

Glasskeið fyri nýbyrjarar. Umframt brúkaragjald verður goldið fyri tilfarð, sum kann keypast á skeiðnum (0,45 kr. pr. gr.)

### Skeið 20: Undirvísing ætlað orðblindum

Tíðarskeið: Eftir avtalu skúlaárið 2017/18
Kostnaður: Ókeypis
Tilmelding: Fridrikka Kjeld, orðblinda- og serlærari í lesing og skriving, 770090

Almenn undirvísing og vegleiðing ætlað orðblindum í øllum aldri.

### Skeið 21: Lær at svimja, vaksin (heystskeið), svimjihøllin

Nær: týskvøld frá 19:30 - 21:00
Byrjar 17. Okt.
Tíðarskeið: Heystskeið: Okt. – des. 2017
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Henny Abrahamsen, 272172

Skeiðið er ætlað tilkomnum fólki, sum eru á byrjanarstøði í svimjing ella sum vilja læra at svimja.

### Skeið 22: Lær at svimja, vaksin (várskeið), svimjihøllin

Nær: týskvøld frá 19:30 - 21:00
Byrjar 16. Januar 2018
Tíðarskeið: Várskeið: Jan. – mars. 2018
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Henny Abrahamsen, 272172

Skeiðið er ætlað tilkomnum fólki, sum eru á byrjanarstøði í svimjing ella sum vilja læra at svimja.

### Skeið 23: Tónleikur, tónleikahølið

Nær: Mánadag kl. 08.00 – 09.30
Fylgir skúlaárinum.
Tíðarskeið: Aug. 2017 – jun. 2018
Tilmelding: Marta á Lakjuni, 267190

Skeið í tónleiki 8. fl. og eldri.

### Skeið 24: Tekning, myndlistahølið

Nær: Mikukvøld kl. 19.00 – 22.00
Byrjar 18 .okt.
Tíðarskeið: Okt. 2017 – mar. 2018
Kostnaður: 800 kr.
Tilmelding: Jens Klæmint Jacobsen, 232343.

Skeiðið er ætlað øllum sum hava hug at tekna. Børn undir 14 ár kunnu luttaka í fylgi við vaksnum.

### Skeið 25: Modelsmíð, smíðhølið

Nær: Týskvøld kl. 19.00 - 22.00
Byrjar 17. okt.
Tíðarskeið: Okt. 2017 – apr. 2018
Kostnaður: 800 kr.
Tilmelding: Ólavur Sjúrðarberg, 213625

Skeiðið er ætlað øllum, sum hava hug at royna seg við modelsmíði.

| Skeið 26: | Callanetics, í gamla FK |
|---|---|
| Nær: | Kl. 18.00 – 19.30.<br>Byrjar týsdagin 17. okt. 10 ferðir |
| Tíðarskeið: | Okt – nov. 2017. |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Áshild Kristiansen, 580025 &<br>Steintóra Nesá, 744720 |

Callanetics-fimleikur kann íðkast av øllum, bæði vandum og óvandum. Við venjingunum styrkir og mennur tú kroppsburðin. Stigvíst gerst tú tilvitað um ónýttar og skeivt nýttar vøddar. Undirvíst verður í bólki, men eisini verður atlit tikið til hvønn einstakan.

| Skeið 27: | Ættargransking, skúlin |
|---|---|
| Nær: | Mánakvøld kl. 19.00 – 21.00<br>Byrjar 23. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – feb. 2018 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Ingibjørn Eldevig, 266233 |

Skeiðið er ætlað øllum, sum hava hug og áhuga fyri ætt-argransking.

## Mentanarhúsið

| Skeið 28: | Samrøður um film |
|---|---|
| Nær: | 5 ferðir: Nov. 2017 – feb. 2018<br>Byrjar hóskvøldið 2. nov. kl. 20.00 |
| Tíðarskeið: | Nov. 2017 – mar. 2018.<br>Hesi hóskvøld: 2. nov, 7. des, 11. jan, 1. feb., 1. mar. |
| Kostnaður: | 100 kr hvørja ferð ella<br>400 kr. fyri alla røðina |
| Lærari: | Torfinnur Jákupsson, 272017 |
| Tilmelding: | Kvøldskúlin 238010 ella við dyrnar |

Samrøður um film" fylgir tráðnum frá undanfarnum "Samrøðum um tónleik", og er ætlað øllum við áhuga fyri filmi, og sum vilja hoyra meira um søguna handan eina ávísa filmsframleiðslu. Í eini fyrilestrar- og samrøðurøð verður prátað við ymisk filmsfólk, sum onkursvegna hava sett síni spor. Hvørt kvøldið verður filmssýning somuleiðis á skránni. Nærri lýsing av skráin kemur seinni.

| Skeið 29: | Dansiskeið fyri ung og vaksin |
|---|---|
| Nær: | Týskvøld kl. 19.00 – 21.00<br>Byrjar 17. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – feb. 2018 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Áshild Kjærbo, 265442 |

Skeið fyri teg sum vil læra at dansa enskan dans, foxtrot, vals og aðrar dansir. Skeiði  verður bert hildið, um 12 ella fleiri tekna seg.

| Skeið 30: | Barnadansur |
|---|---|
| Nær: | Mánakvøld kl. 19.00 – 20.00<br>Byrjar 6. nov. |
| Tíðarskeið: | Nov. 2017 – feb. 2018 |
| Kostnaður: | ókeypis |
| Samskipari: | Jonleif Johannesen, 457536 |

Føroyskur dansur og dansispøl fyri børn og øll dansiáhugað. Í steðginum saft og onkur kvæðasøga verður eisini at hoyra. Børn undir skúlaaldur kunnu luttaka saman við vaksnum. 21. apríl verður barnadansistevna á Sandi.

## Stropin, Kambsdalur

| Skeið 35: | Pilates 1: á byrjanarstøði |
|---|---|
| Hvar: | Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali |
| Nær: | Mán. og mik. kl. 18.00 – 19.00.<br>Byrjar 2. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. – des. 2017. 2 ferðir um vikuna í 10 vikur. |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Benadicta S. Ellingsgaard,<br>fysioterapeutur, 744748 |

Pilates 1: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; stimbrar magatarmfunktiónina; stimbrar blóðrenslið; mótvirkar strongd; økir kroppstilvitanina. Venjingin verður gjørd á undirlagi/ máttu, sum tit hava við sjálvi um tit eiga eina slíka.

## Skeið 36: Pilates 2: Feittforbrenning – rørsla, ið fær pulsin upp á feittforbrenningsstøði

Hvar: Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali
Nær: Mán. og mik. kl. 19.00 – 20.00
Byrjar 2. okt.
Tíðarskeið: Okt. – des. 2017. 2 ferðir um vikuna í 8 vikur
Kostnaður: 400 kr
Tilmelding: Benadicta S. Ellingsgaard, fysioterapeutur, 744748

Pilates 2: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; økir konditiónina; minkar um vektina.

## Skeið 37: Pilates 3: Fyri tey, ið hava roynt tað áður – styrkjandi venjingar til allan kroppin

Nær: Mán. og mik. kl. 20.00 – 21.00
Byrjar 2. okt.
Tíðarskeið: Okt. – des. 2017. 2 ferðir um vikuna í 10 vikur
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Benadicta S. Ellingsgaard, fysioterapeutur, 744748
Hvar: Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali

Pilates 3: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; stimbrar magatarmfunktiónina; stimbrar blóðrenslið; mótvirkar strongd; økir kroppstilvitanina. Venjingin verður gjørd á undirlagi/máttu; sum tit hava við sjálvi um tit eiga eina slíka.

## Skeið 38: Pilates 1 (2018): á byrjanarstøði

Hvar: Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali
Nær: Mán. og mik. kl. 18.00 – 19.00
Byrjar 8. jan
Tíðarskeið: Jan. – mars. 2018. 2 ferðir um vikuna í 10 vikur
Kostnaður: 400 kr.
Tilmelding: Benadicta S. Ellingsgaard, fysioterapeutur, 744748

Pilates 1: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; stimbrar magatarmfunktiónina; stimbrar blóðrenslið; mótvirkar strongd; økir kroppstilvitanina. Venjingin verður gjørd á undirlagi/máttu, sum tit hava við sjálvi um tit eiga eina slíka.

## Skeið 39: Pilates 2 (2018): Feittforbrenning – rørsla, ið fær pulsin upp á feittforbrenningsstøði

Hvar: Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali
Nær: Mán. og mik. kl. 19.00 – 20.00
Byrjar 8. jan.
Tíðarskeið: Jan. – mar. 2018. 2 ferðir um vikuna í 8 vikur
Kostnaður: 400 kr
Tilmelding: Benadicta S. Ellingsgaard, fysioterapeutur, 744748

Pilates 2: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; økir konditiónina; minkar um vektina.

| Skeið 40: | Pilates 3 (2018): Fyri tey, ið hava roynt tað áður – styrkjandi venjingar til allan kroppin |
|---|---|
| Nær: | Mán. og mik. kl. 20.00 – 21.00<br>Byrjar 8. Jan. |
| Tíðarskeið: | Jan. – mar. 2018. 2 ferðir um vikuna í 10 vikur |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Benadicta S. Ellingsgaard, fysioterapeutur, 744748 |
| Hvar: | Stropin – Salurin á ovaru hædd í barnagarðinum á Kambsdali |

Pilates 3: Økir styrki, stabilitet og mobilitet; stimbrar maga-tarmfunktiónina; stimbrar blóðrenslið; mótvirkar strongd; økir kroppstilvitanina. Venjingin verður gjørd á undirlagi/ máttu; sum tit hava við sjálvi um tit eiga eina slíka.

## Onnur støð í býnum:

| Skeið 31: | Fornfrøðilig-søgulig námsferð til Vestur-Skotlands og Hebridurnar |
|---|---|
| Nær: | Ferðin, frá mánadegi til mánadags, verður eftir ætlan 17. til 24. sep. 2018 |
| Tilmelding: | Áðrenn 1. nov 2017. |
| Kostnaður: | 400 kr. – umframt ferðaútreislur mettar at verða millum 8500 – 10.000 kr. pr. pers. (í dupultkamari). Kostnaðurin er fyri ferðaleiðara, flogferð, ferðing, gisting, leigubuss v.m. |
| Tilmelding: | Mag. art. í fornfrøði Steffen Stummann Hansen, 283085 ella Fuglafjarðar Kvøldskúli 238010 |

“Fornfrøðilig-søgulig námsferð til Vestur-Skotlands og Hebridurnar, har sjóneykan verður sett á, hvønn týdning økið hevur havt fyri tann fyrsta kristindómin og landnámið í víkingatíðini í Føroyum.

Í september í 2016 skipaði Kvøldskúlin í Fuglafirði í sam-starvi við Norrøna felagið í Føroyum fyri eini námsferð til Skotlands og Orknoyggjar, har evnið var skotska søgan, norrønar røtur og har vit vitjaðu týdningamikil fornminnir og søgulig støð. Hugskotið við ferðini var, at undirvísingin var á sjálvari ferðini. Ferðin eydnaðist stak væl, og eftir ferðina vísti tað seg at vera stórur áhugi fyri at fyrireika eina líknandi ferð til Hebridurnar, eisini í samstarvi við Norrønafelagið.

Ferðin verður í døgunum 17. – 24. september 2018. Flogið verður úr Vágunum til Edinburgh, hagani ferðalagið koyrir í leigubussi móti Vestur-Skotlandi og Hebridurnar. Vit fyrireika í løtuni eina ferðaætlan, har vit millum annað vitja oyggjarnar Mull, Iona, Skye og Lewis.

Sum partur av hesum skeiðstilboðinum skipa vit fyri 1- 2 fyrireikandi fundum í Fuglafirði á vári 2018.

Túrurin verður bert gjørdur, um í minsta lagi 20 tilmeldingar eru. Fyrispurningar um ferðaskrá o.a. eru vælkomnir. Allar-seinasta freist fyri tilmelding er 1. nov. 2017.

| Skeið 32: | Kom og ger film, Bókasavnið |
|---|---|
| Nær: | Týskvøld kl. 18.00 – 21.00<br>Byrjar 17. okt. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – feb. 2018 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Pætur Høj 288007 og Alvin Ellebye Andersen |

Hav egna telefon, teldil, digitalkamera ella okkurt sovorit við og kom á bókasavnið og ger film. Undirvísarnir arbeiða dagliga við at gera film.

| Skeið 33: | Telduskeið, Lonin |
|---|---|
| Nær: | Mán. Og týs. kl. 16.00 – 18.00<br>Byrjar sep. 2017 |
| Tíðarskeið: | Sep. 2017 – mai 2018 |
| Tilmelding: | Johnny Lassaberg 238011, teldulæra og Anna Berjastein 238095, Dagtilhaldið |

Skeiðið er partur av eldratilboðnum í Lonini.

Dagtilhaldið er annars opið mánadag, týsdag og mikudag kl. 15.00 – 18.00

| **Skeið 34:** | **Fuglafjarðar Sangkór, kirkjukjallarin** |
|---|---|
| Nær: | Mikukvøld kl. 20.00 – 22.00 |
| Tíðarskeið: | Sep. 2017 – mai 2018 |
| Kostnaður: | Ókeypis |
| Tilmelding: | Heðin Kambsdal, 222421 |

| **Skeið 41:** | **Fuglafjarðar Hornorkestur, hølið hjá hornorkestrinum** |
|---|---|
| Nær: | Hóskvøld kl. 20.00 – 22.00 |
| Tíðarskeið: | Sep 2017 – juni 2018 |
| Kostnaður: | Ókeypis |
| Tilmelding: | Jóhan Hentze, 252319 |

| **Skeið 42:** | **Lesiringurin, Bókasavnið** |
|---|---|
| | (fyriskipari Fuglafjarðar Bókasavn) |
| Nær: | Eitt týskvøld um mánaðin kl. 19.30 |
| Tíðarskeið: | 1 ferð um mánaðin. Byrjar í oktober |
| Kostnaður: | Ókeypis |
| Tilmelding: | Fuglafjarðar Bókasavn, 238016 ella bokasavn@fuglafjordur.fo |

Lesiringurin avtalar hvørjar bøkur, ið skulu lesast. Síðani hittast vit til eitt prát um mánaðarinnar bók aftur við einum drekkamunni.

| **Skeið 43:** | **Byrjanarskeið í harmonikusamanspæli, Sjóstovan Unika** |
|---|---|
| Nær: | Hóskvøld kl. 19.00 – 21.00<br>Byrjar 19. oktober |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – feb. 2018 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Hóraldur Joensen 289893 og 441893 |

Byrjanarskeið í harmonikusamanspæli fyri roynd og óroynd.

| **Skeið 44:** | **Skriviskeið við Sólgerð og Haldu, Sjóstovan Unika** |
|---|---|
| Nær: | Várið 2018 |
| Kostnaður: | 400 kr. |
| Tilmelding: | Sólgerð Andreassen 505252 og Halda Hansen. |

Skipað verður fyri skriviskeiði í vár. Nærri kunning á várskránni, ið kemur út um ársskiftið.

| **Skeið 45:** | **Ymiskar løtur á Vesturstovu, Vesturstova** |
|---|---|
| Nær: | Eitt mikukvøld um mánaðin kl. 19.00 – 21.15: 18. okt., 15. nov., 13. des., 17. jan., 14. feb., 14. mar., 11. apr. og 16. mai. |
| Tíðarskeið: | Okt. 2017 – mai 2018 |
| Kostnaður: | ókeypis |
| Samskipari: | Áshild Kristiansen |

Eitt mikukvøld um mánaðin frá kl. 19.00 – 21.15 verður skipað fyri hugna, rørslu, upplestri, tónleiki ella sangi á Vesturstovu

- Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikum.
- Luttøkugjaldið verður flutt á konto 9865 – 9933284 í Norðoya Sparikassa tá skeiðið er byrjað. Minst til at viðmerkja navn og skeiðnummar á flytingina og boða læraranum frá um flytingina..
- Luttakararnir gjalda fyri tilfar, ið nýtt verður í undirvísingini.
- Tilmelding fer í flestu førum fram beinleiðis til læraran á skeiðnum.
- Vegleiðandi kostnaðurin er 800 kr. fyri skeið, ið eru longri enn 40 tímar og 400 kr. fyri skeið, ið eru styttri.
- Skráin og faldari við nærri kunning um skeiðini er eisini at síggja á www.fuglafjordur.fo og á Facebook: Kvøldskúlin í Fuglafirði. Faldarin verður borin út í øll hús í kommununi.
- Flaggdagin, 25. apríl 2018 verða tónleikaframførslur og framsýning av handaligum arbeiði
- Fuglafjarðar kvøldskúli tlf. 238010, t-post: kvoldskuli@fuglafjordur.fo

Meira kunning fæst við at seta seg í samband við:
Fuglafjarðar Kvøldskúla, tel 23 80 10,
t-post: kvoldskuli@fuglafjordur.fo,

www.facebook.com/fuglafjordurkvoldskulin

Fuglafjarðar kommuna · Ennivegur 38 · Tel 668 000
info@fuglafjordur.fo · www.fuglafjordur.fo


Helena Kjeld